# ur aktivitetur
# lu Mørk





**UMVÆLING**

*Av og á hevur dagstovnurin brúk fyri eini hentari hond frá einum handverkara. Húsavørðurin Hallur er komin á gátt og hevur fingið nøkur ting sum hann skal taka sær av. Men Ísak, Árni, Emma og Dina eru tó fegin um, at hann gevur sær tíð til tey eina løtu*




**FRIÐUR**

*Vanliga duga børnini væl at halda gang, men her í dagstovninum skal eisini vera høvið til eina friðarliga løtu. Nú tíðindatænastan er á vitjan kunnu Lilja og Ísak ikki bara sær fyri at forvitnast eina løtu*

fyri børnini: Her kunnu tey yngru spegla sær í teimum eldru, meðan tey eldru læra at taka sær av teimum yngru.

- Tað vísir seg at rigga avbera væl, siga starvsfólkini.

Tey allarflestu av teimum 14 børnunum koma úr bygdini, meðan eitt teirra kemur allan vegin úr Skálafirði.

## Matur

Eins og nógva aðrastaðni, fara eisini fólk úr Oyndarfirði í onnur støð at arbeiða. Hava tey børn í barnagarðsaldri, er møguleiki at lata tey upp í hendurnar á starvsfólkunum longu klokkan 7:30 um morgunin.

Tá byrja børnini at spæla saman, fram til umleið klokkan hálvgum tíggju, tá "rundan" er á skránni. Og síðani gongur dagurin við ymiskum virksemi.

Her sita børnini saman og hugna sær við søgu, sangi, virksemi, eins og frukt verður býtt út til teirra. Er veðrið til vildar, verður farið út í garðin at spæla.

- Men soleiðis sum veðrið er í dag, við bæði regni og vindi, er ikki hugsingur um at fara útum. So í dag halda vit okkum innanveggja, siga starvsfólkini.

Henda mikudagin kundu børnini longu tíðliga fyrrapartin gleða seg til, og ikki minst lukta seg fram til, eitt serligt punkt á skránni: Døgurðan, sum í dag var samansettur av "kylling og chips".

Jú, eingin ivi um at børnini trívast og hugna sær her í dagstovninum. Í dag eru tey 14, men spurningurin er altíð, um tey megna at halda talinum eftir summarfrítíðina.

snorri@sosialurin.fo